

*Lena Ziskason er laborant teknikari hjá Kemilux, og hon er eisin millum teirra, sum hava framløgu á vaskiskeiðunum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Kemilux bjóðar vaskifólki á skeið

**– Tað er umráðandi at brúka sápu, har tað er neyðugt – og tað er tað í nógvum førum, um køkar, skrivstovur, stovnar og virkir skulu halda neyðuga reinføri. Men tríggjar ferðir ov nógv sápa, kann saktans gera vaskingina tríggjar ferðir verri, sigur stjórin í Kemilux, Debes Petersen, sum bjóðar fólki, ið vaska á arbeiðsplássum kring landið, á vaskiskeið**

VASKIKUNNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kemilux er nú meira miðvíst farið undir at læra fólk, sum fáast við vanliga reingerð kring landið, at vaska og brúka sápu við atliti til reinføri og umhvørvi.

Higartil hevur fyritøkan skipað fyri tveimum skeiðum í vaskikunning í bygninginum hjá Poul Mohr á Sandvíkarhjalla, og á tí fyrra skeiðnum var Sosialurin fram við eina løtu.

### Fleiri framløgur

Tey, sum hava havt framløgur á skeiðunum hjá Kemilux, eru Jóhanna Zachariassen, góðskuleiðari, Lena Ziskason, laborant teknikari, Jón Miðberg, sum hevur verið sølumaður í mong ár, Rebecka Rubecksdóttir, sølufólk og Hans Andrias (Hassadi) Midjord, sølufólk.

Stjórin í Kemilux, Debes Petersen, sigur, at hvørt skeiðið higartil hevur vart í tríggjar tímar, frá 13-16, men fyritøkan hugsar sær, at skeiðini verða fyriskipað frá morgunstundini.

– Fleiri av teimum, sum hava verið við á hesum skeiðum, vaska á ymiskum stovnum, skrivstovum og arbeiðsplássum eftir arbeiðstíð, og tí noyðast tey ofta beint til arbeiðis, tá ið skeiðið er av.

### Lítil kostnaður

Hann sigur, at tað eru sølufólkini hjá Kemilux, sum hava bjóðað vaskifólki til hesa vaskikunning. Talan er bæði um viðskiftafólk hjá Kemilux og onnur, sum ynskja at luttaka á slíkum skeiði.

– Tá ið vit hava fingið eitt hampiligt tal av fólki, sum hava hug at koma á skeið, hava vit havt hesa vaskikunning, sum vit rópa tað.

Tað eru vanliga arbeiðsplássini, sum senda fólk á skeiðini hjá Kemilux, og hetta er ikki nøkur stór íløga. Skeiðini eru nevniliga rættiliga bílig.

– Vit hava tikið 250 krónur frá hvørjum luttakara – við mvg, so hetta er ikki nakað, ið tyngir serliga nógv um hjá arbeiðsgevaranum, sigur Debes Petersen.

Hinvegin, sigur hann, kann tað eisini spara um nýtsluna av sápu, at fólk fáa hesa kunning og vegleiðing.

### Sápa neyðug

Tey, sum higartil hava verið til vaskikunning hjá Kemilux, eru eitt nú vaska skúlar, skrivstovur og stovnar.

Kemilux er útbjóðari av øllum, sum vaskifólk hava brúk fyri, bæði sápu og øllum teimum amboðum, sum brúkt verða til vasking og reingerð.

– Í dag er tað líkasum vorðin "móti", at fólk í minst møguligan mun skulu brúka sápu til reingerð. Tað er umráðandi at brúka sápu, har tað er neyðugt – og tað er tað í nógvum førum, um køkar, skrivstovur, stovnar og virkir skulu halda neyðuga reinføri.

Men, leggur Debes aftrat:

– Sápa skal brúkast við skili, og umráðandi er at brúka røttu sápuna til rætta endamálið. Vit læra vaskifólk um, hvussu umráðandi tað er at lesa etikettina, sum sigur, hvussu sápan skal blandast.

### Alt við skili

Hann vísir á, at tríggjar ferðir so nógv sápa, sum etikettin sigur, kann merkja, at hølini – í staðin fyri at vera rein – saktans kunnu gerast tríggjar ferðir so skitin, um man so kann siga.

– Tí er umráðandi, at vaskifólk eru nærløgd og leggja sær í geyma, hvussu sápan skal brúkast í reingerðini, sigur hann.

Kemilux selir eisini onkrar lappar, sum eru ætlaðir til at pussa rútar við.

– Hesir lappar skulu vætast, og síðan verða rútarnir pussaðir – við ongari sápu, sigur Debes Petersen, stjóri á Kemilux.

At vaska er ikki bara at vaska:

# Góð upplæring ei

**– Vit læra vanlig vaskifólk at lesa etikettina, soleiðis at sápan verður rætt blandað, vit læra tey um ph-virði, og vit læra tey at brúka røttu sápuna til rætta endamálið fyri at náa besta úrslitinum. Ein partur av frálæruni er eisini tey amboð, sum eru tøk á marknaðinum til vasking og reingerð, sigur Jón Miðberg, ið er ein teirra, sum hevur framløgu á vaskiskeiðunum, ið Kemilux skipar fyri**

VASKIKUNNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jón Miðberg sigur, at tað, sum Kemilux vil við vaskikunningini, er at upplýsa um sápu, amboð og umhvørvi, tá ið vaskað verður.

– Vit kunna vanlig vaskifólk – viðskiftafólk og onnur, sum hava áhuga fyri skeiðunum – um ymisku sløgini av sápu, sum Kemilux framleiðir, og hvussu tey skulu brúka sápuna – alt eftir, hvørjar vaskiuppgávurnar eru.

Hann sigur, at tað eru laborantarnir hjá Kemilux, sum kunna um sjálva sápuna – um talan er um sonevndar náttúrligar sápur ella syntetiskar sápur, soleiðis at hesar ikki bara verða brúktar, sum best ber til.

### Vanlig reingerð

– Eg havi sjálvur verið á skeiðum, ið snúgva seg um reingerð av eitt nú matvøruvirkjum og sóttreinsan, men í slíkum føri er talan um heilt aðra reingerð enn hana, vit tosa við vaskifólk um. Innan matvøruframleiðslu tosa vit um bakteriur og mikroorganismur av ymiskum slagi, og tá er neyðugt við heilt aðrari frálæru – á einum heilt øðrum støði.

Jón Miðberg sigur, at tey, sum hava luttikið á skeiðunum hjá Kemilux, siga, at tey eru farin avstað aftur við eini størri og breiðari vitan um sápu og reingerð.

– Jú, fólk eru ógvuliga glað fyri vaskikunningina, bæði tey, sum hava havt vaskiarbeiði leingi og tey, sum eru nýggj í "fakinum".

Hann vísir á, at eitt fólk, sum fyrstu ferð hevur fingið vaskiarbeiði, veit av sær sjálvum ikki ítøkiliga, hvussu best er at bera seg at – fyri at náa besta úrslitinum, bæði við reingerðini og likamliga partinum.

– Tey kunnu soleiðis bara hyggja at, hvussu hini loysa uppgávuna og síðan royna sum best. Nú kunnu tey luttaka á okkara skeiðum og fáa hesa upplæring, og tað kann vera ein stórur fyrimunur í arbeiðnum.

– Vit læra tey at lesa etikettina, soleiðis at sápan verður rætt blandað, vit læra tey um ph-virði, og vit læra tey at brúka røttu sápuna til rætta endamálið fyri at náa besta úrslitinum, sigur hann.

### Likamligi parturin

Jón sigur, at ein partur av frálæruni er eisini tey amboð, sum tøk eru á marknaðinum til vasking og reingerð.

– Hetta er tann ergonomiski parturin av kunningini, har dentur verður lagdur á, at fólk ikki fáa likamlig mein av arbeiðnum, sum kann vera tungt og strævið. Tí eru amboðini eisini ein náttúrligur partur í frálæruni.

Hann vísir á, at nógv vaskifólk gjøgnum tíðirnar hava fingið likamligar skaðar av vaskiarbeiði.

– Í "gomlum" døgum høvdu tey bara eina skrubbu og eina tvøðu, men nú eru umstøðurnar – eisini í so máta – nógv betur, tí amboðini eru fleiri og betri.

Jón sigur, at tá ið eitt gólv ella ein trappa er nývaskað, er eisini skilagott at lata fólk fáa hetta at vita, soleiðis at tey ikki glíða og sláa seg í.

– Hetta kann gerast við einum skelti sum sigur, at gólvið ella trappan eru nývaskað. Hetta er ein



*Fólk eru ógvuliga glað fyri vaskikunningina, bæði tey, sum hava havt vaskiarbeiði leingi og tey, sum eru nýggj í "fakinum"*
*Mynd: Vilmund Jacobse*